# Hugnajól í mið

**Einki minni enn Jólaskip - Jólahús - Jólabýur stóðu mongu hundraðtals børnunum í boði at vitja, tá sætt jólahald var í Havn leygardagin**





### JÓLAHALD

Nógv varð gjørt burtur úr jólahugnanum í Havn leygardagin. Hetta var eisini dagurin, tá Jólaskipið kom í Vágsbotn við tí góðu lastini, fleiri jólamonnum og stúgvandi fullum jólaposum. Eisini var stúgvandi fult av fólki komið saman undir Bryggjubakka klokkan 15, tá Jólaskipið, Thorshavn, legði at bryggju. GHM spældi og setti sín serstaka dám á jólahaldið. Eftir tað var farið niðan í Jólabýin á Reyni, sum er vorðin eitt sætt „hitt" hesi jólini.

Somuleiðis gekk leiðin niðan í Jólahúsið, sum í ár var einki minni enn Miðlahúsið í Vágsbotni. Vanliga er jólahús í Græsagarði, men tað eydnaðist ikki at fáa hetta klárt til hesi jólini og fyri at rætta eina hjálpandi hond og vera við til at gera jólini í miðbýnum enn hugnaligari og fjølbroyttari beyð Miðlahúsið seg fram sum Jólahús.

Ungir tónleikarar frá Musikskúlanum spældu jólaløg og annars var stórt gestablídni í Jólahúsinum við m.a. Topppopp-saft frá MBM, kaffi og karamellum. Bakgarðurin vestan fyri Miðlahúsið, sum hevur ligið fjaldur og stongdur, varð latin upp fyri almenninginum henda dagin og er ætlanin, at hann eisini í framtíðini skal kunna vera opin fyri almenninginum, eitt nú í sambandi við tiltøk av ymsum slag, so sum smærri uttandura konsertum.

Eftir ein steðg í Jólahúsinum varð farið niðan í Gongugøtuna, har GHM spældi. Sanniliga má sigast, at tiltøkini í miðbýnum í Havn leygardagin vóru væl skipað og væleydnað.








